# Frændur rukku ikk

**Føroya størsti og besti sing-along bólkur spældi á Vágsbø leygarkvøldið, men hóast teir helst eru fólkakærasti bólkurin í landinum, so tóktust Frændur at hava trupulleikar við at fáa sama lag á fjøldina, sum tað vanliga er til teirra konsertir**

UMMÆLI
*Sveinur Dam*
*sveinur.dam@gmail.com*

At tað vanliga er ein stór fólkaveitsla, tá Frændur hava konsert, er eingin loyna. Tí var eisini væntandi, at teir leygarkvøldið veruliga sparkaðu lív í fjøldina, ið tíverri ikki fylti so nógv á Vágsbø sum man kundi ynskt. Um fólk vóru troytt av at syngja við, eftir Dynamittt veitsluna kvøldið áðrenn, skal eg ikki siga, men tað tóktist, at garvaðu menninir á pallinum høvdu trupulleikar við at náa heilt út til fjøldina, og stórar partar av framførsluni manglaði tann serligi stemningurin, ið vanliga er til eina Frændur veitslu. Ikki fyrr enn Terji Rasmussen kom á pallin, og byrjaði at syngja Eros, kendist tað sum lív kom í áhoyrararnar. Men tó var ongantíð tann serligi veitslurómurin, ið plagar at eyðkenna Frændur.

### Gott gamalt og nýtt

Framførslan var eisini merkt av, at tónleikararnir tóktist eitt sindur troyttir ella so. Kemiin var ikki heilt, sum hon plagar, hóast teir ikki hava spælt so lítið í summar. Møguliga hevur tað havt onkra ávirkan, at framførslan var longu kl. 19.15, og fólkið tískil ikki var




# Við Marius í balli hjá Armando

**Pallurin í Flagstjaldinum var umbygdur til hugnaligu stovuna hjá Armando, tá Marius og hinir í bólkinum bjóðaðu til hugnaliga tónleikaveitslu**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*
*post@sosialurin.fo*

Flagstjaldið er nógv, men hugnaligt er tað ikki, og tí var tað heilt løgið at traðka inn har og síggja, hvussu hugnaligur pallurin var, tá Marius og bólkurin spældu leygarkvøldið. Veggir við stríputtum tapeti, vóru settir upp, og á pallinum var innrættað við lenistólum og standilampum. Á veggjunum hekk ein einsamøll LP og ein gittarur millum myndirnar.

Frásøgumaðurin Ólavur Presley var fyrstur á pallin, men har er eingin rødd eftir, so illa hann hevur rópt seinastu dagarnar. Okkurt fullkomiliga óskilligt gralaði úr honum og áðrenn hann hevði bjóða bólkinum vælkomnum, hevði Armando smitað hann út úr sínari stovu. Armando vann herfyri fyrstu heiðursløn á árligu yvirskeggjaveitsluni, og í síni Hawai skjúrtu og Bermuda shortsi bjóðaði hann Marius og bólkinum inn til ball hjá Armando.



Karmarnir vóru sostatt heldur øðrvísið, til hesa framførsluna enn vanligt er, og tað riggaði væl til nýggju útgávuna av Marius, har ravmagnsrokkurin er skiftur út við kassagittarar, slagverk og harmoniku. Allir tónleikararnir vóru framúr, og stuttligt var at hoyra, hvussu væl tað riggaði við røddunum hjá Hans Mariusi saman við gamla Flux trummuleikara-